# 5. tími

*æ*

*Staviorð:*

1 gjár
2 lá
3 kletti
4 henni
5 pinn
6 menninir
7 eisini
8 sneis
9 fjalli
10 allan
11 komnar
12 ofta
13 lofta
14 fleyt
15 tað
16 lítið
17 tá ið
18 niður
19 eitur
20 onnur
21 dukkur
22 kemur
23 gentur
24 funnu
25 kunnu
26 viku
27 fjøruna
28 skúlanum
29 honum
30 einum
31 abbi
32 Margreta
33 Ragna
34 Súsanna
35 Súsonnu
36 fyri
37 mær
38 tær
39 sær
40 væl
41 ær
42 spæla
43 spældu
44 næstan
45 næsta
46 næstu
47 rætt
48 rættina
49 *bræv*
50 *tvær*
51 *træ*






## Fyrisøgn

Eg fe*kk* br*æ*v frá *Súsonnu í gjár.* Hon *ke*mur at vi*tja* okkum í næstu viku; og *tvær* gentur koma við henni. Onnur eitur Margreta, og onnur eitur Ragna. Tað dámar mær væl, tí tær kunnu so væl at lofta og at spæla við dukkur.

Súsanna skrivar mær so ofta bræv. Ein dagin fóru hon og Margreta oman í fjøruna at spæla. Tá funnu tær eina sneis, sum lá niður við einum kletti; og úti fyri ein*um* steini fle*y*t eisini eitt lítið tr*æ*. So fóru tær at spæla pi*nn*. Tær spældu næstan allan dagin; og eisini næsta dagin spældu tær pinn, tá ið tær vóru komnar úr skúlanum.

Í dag eru menninir á fjalli; og nú fer abbi niðan á rættina at vita, um ein ær hjá honum er komin í rætt.

Ger tær eina tílíka talvu í heftið. Skriva nøvnini á forfedrum tínum.

Hvaðani eru (vóru) tey?
Hvar búgva (búðu) tey?
Hvussu gomul eru tey, sum enn eru á lívi?
Nær hava tey livað?

Sig frá, hvat ið onkur av teim tókst við. Hvat arbeiði hava (høvdu) tey.